# HEILSANIR



**Góða Rebekka Mouritsen**
Tillukku við 6 ára degnum tann 5. februar.
**Heilsan babba**



**Góða Mary**
Lukku og gleði á tínum 6 ára føðingardegi 5. februar. Má Jesus pápi signa framtíð tína.
**Heilsan mamma, babba, Súni, Sonny og Ása**


Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ____________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ____________________
Bústaður: ____________________
Bygd/býur: __________ Tlf.: __________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


# TILTØK


SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800


**Føstugudstænastur**
**Mikukvøldið, 6. feb.**
***Vesturkirkjan*** kl. 20 Elsa Funding
***Sørvágur:*** kl. 20 Sverri Steinhólm
***Tjørnuvík:*** kl. 19 Hanus Simonsen
***Haldórsvík:*** kl. 20.30 Hanus Simonsen
***Glyvrar:*** kl. 20, Niels Pauli Danielsen, Glyvra streingjakór syngur
***Selatrað:*** kl. 20, altarg, Jógvan Fríðriksson, biskupur
***Gøta:*** kl. 20 Símun Jacobsen
***Fuglafjørður:*** kl. 20, Uni Næs. Niels Midjord og Petur Jacob Eliasen syngja
***Leirvík:*** kl. 20, lestur
***Kollafjørður:*** kl. 20, Meinhard Bjartalíð
***Vestmanna:*** kl. 20, Ann Hansen
***Porkeri:*** kl. 19, Patrick de Neergaard

**Hóskvøldið, 7. feb.**
***Miðvágur:*** kl. 20 Hanus Simonsen.
***Ritvík:*** kl. 19, Inga Poulsen Dam.
***Funningur:*** kl. 20 Uni Næs
***Nes:*** kl. 20.15, Inga Poulsen Dam
***Christianskirkjan:*** kl. 20, Martin Restorff Jacobsen

**Sunnukvøldið 10. feb.**
***Sandavágur:*** kl. 18 David Johannesen
***Árnafirði:*** kl. 19 Hanus Simonsen
***Kunoy:*** kl. 20.15 Hanus Simonsen

**Gudstænastur -**
**1. sunnudag í føstu**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Jógvan Fríriksson biskupur. ***Tað er sunnudagsskúli í kirkjukjallarnum undir gudstænastuni***
***Kirkjubø:*** kl. 12 Kristine Hestbech
***Argir:*** kl. 11 Familjugudstænasta Hanus Simonsen altargongd
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Heri Joensen
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Lestur
***Bøur:*** kl. 11 David Johannesen. ***Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Heimamissiónina***
***Hósvík:*** kl.12, Inga Poulsen Dam
***Hvalvík:*** kl. 12, Theodor E. D. Olsen
***Skálafirði:*** kl. 17 Emil Olsen
***Funningur:*** kl. 12 messa Emil Olsen
***Gøta:*** kl. 12, altarg., Martin R. Jacobsen. ***Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Heimamissiónina***
***Elduvík:*** kl. 12, altarg., Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11, lestur
***Svínoy:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Hvalba:*** kl.12.30 Familjugudstænasta Símun Jacobsen ***Talvan gongur fyri kirkjuligu heimamissiónina.***
***Leiti: kl. 12,***
***Eldrabýlið í Vági:*** kl. 14, Patrick de Neergaard

***1. sunnudag í føstu gongur talvan fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Porkeris kirkju.***

**Kvívíkar kirkja**
Leygarkvøldið kl. 19 hevur Kristine S. Hestbech fyrilestur í Kvívíkar kirkju um »Det gode liv«.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Einki møti hóskvøldið og sunnukvøldið.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20 Húsbólkar. Einki møti í Hebron.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka.
Kl. 12: Sunnudagsskúli og møti. Á møtinum talar Páll Poulsen.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Anniku við Skipá, (sjónvarpsupptøka)
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Lívdin**
**í Hoyvíkar skúla**
Onki ungdómsmøti fríggjakvøldið.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti har Absalon Áargarð talar.
kl. 11.30 er Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Jógvan talar um »Frá steinhjarta til kjøthjarta« 6. partur,
kl. 12 Sunnudagsskúli.
Barnaansing er undir báðum møtinum fyri børn undir skúlaaldur.
Møtini hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið kl. 20 á Brekku møti, har Jógvan undirvísir um »Andaligu gávurnar og tænastan í samkomuni«.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Bibliugransking verður mikukvøldið kl. 20, evnið: Elias.

**Adventkirkjan**
Mikukvøldið hevur Jens V. Danielsen fyrilestur um Dánielsbók.

**Katólska Kirkjan**
***Øskudagur:*** Orðsins tænastan við kommunión verður í Mariukirkjuni mikukvøldið 6. februar kl. 19.30.
Hóskvøldið 7. feb. kl. 20 verður Taizé-kvøld í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Fríggjadag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wienczslaw Barwinski, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli. www.katolsk.fo

**Missiónsvika á Argjum**
Týsdagin kl. 19.30 Møti við Jaspuri Langgaard, Nesi. Andrias Magnussen syngur.
Mikudagur kl. 19.30 Møti við Regin Høgnesen, trúboðara. Rannvá, Jútta og Jens Michael syngja.
Hósdagur kl. 19.30 Møti við Sverra Steinhólm, presti. Manskórið í Fuglafirði syngur
Fríggjadagur kl. 19.30 Møti við Bjartur F. Johannesen, ungdómstrúb. Ungdómskórið Effata á Strondum syngur. Innsavnan til ungdómsarbeiðið.
Leygardag kl. 19.30 Møti við Knút Larsen, Fuglafirði. Streingjakórið í Porkeri syngur.
Innsavnan til landsarbeiðið.
Sunnudagur kl. 11 Familjugudstænasta við altargongd. Hanus Simonsen, prestur, prædikar.
Aftaná gudstænastuna fáa børnini okkurt gott omaná.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Olaf Magnussen, Toftir. Argjakórið syngur. Innsavnan til húsið. Bønarmøti hálvan tíma áðrenn møtini. Barnaansing í vikuskiftinum.

**Ebenezer**
Týsdag kl. 18.55 Sangvenjing – Gospel Hearts
kl. 20.00 Sangvenjing - Ebenezerkórið.
Mikudag kl. 17.15 Sangvenjing - Kassia
kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti
Hósdag kl. 17 Sangvenjing – Barnakórið – Gentir og dreingir 7-9 ár,
kl. 20 Ungdómsmøti – Talari: Jens Olsen.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Týsdagin kl. 16 eldrahugni.
Mikudagin kl. 17.30 guitarfrálæra. Einki ungdómsmøti fríggjakvøldið vegna ungdómsmøti í Oasuni hóskvøldið.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar, kl. 18 møti við Joseph Prince á stórskíggja.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti við Filadelfia og Oasuna. http://www.gospel.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 Børn fyri Býnum og Ísrael,
kl. 18.00 Delli (3. til 6. fl.)
kl. 20.00 Chill (7. til 10. fl.)
Hóskvøldið kl. 20 Felags Ungdómsmøti í Oasuni - einki Flare verður leygardagin.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta - Alex O'Campo talar, 11.30 Barnagudstænasta.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15 Bønarløta í salinum.
Hósdag kl. 20 Heimaforbund. Major Brit Knedal vitjar. (mint verður á at hava ein pakka við hvør).
Fríggjadag kl. 19,30 Ársfestin hjá samkomuni.
Leygardag kl. 20 Møti.
Sunnudag møtir kl. 11 og kl.18 (bøn kl. 17,30). Vit hava vitjan alt vikuskifti av Feltsjefinum major Jan Øystein Knedal og konuni Brit, tey syngja og tala á øllum møtum, øll eru vælkomin. Sunnudag kl. 14,00 sunnudagsskúli. Suppa,sápa og frelsa síðan 1865.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 9. februar kl. 19.30 møti fyri kvinnur í Evangeliihúsinum. Tórhild Bjarkhamar talar um lívskvalitet.
http://www.aglow.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími v. Ejvind Mouritsen, 1. Pæt. 1.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Bjartur Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Christian Martin Christiansen.
Møti sunnukvøld verður tulkað til enskt.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing kórið venur.
Mikudagin 6. feb.: Kaffi í Vesturkirkjuni eftir føstugudstænastuna.
Leygardagin kl. 19 í KFUK: Varðmenn hittast til veitslu.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Nardus**
hevur evangeliskt møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 9.2. kl. 19.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Miðvágs missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikukvøldið kl. 19.30 LJÓS syngur. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Møti kl. 18 við Egin og Maritu Henriksen.

**Vágar - Kedron í Sørvági**
Fundarøð undir heitinum »Frelsa, friður og frælsi í Kristusi« verður í Kedron í Sørvági mikukvøldið 6. og hóskvøldið 7. feb. kl. 20.
Fundarøðin heldur fram í skúlanum í Miðvági fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17. Svenning av Lofti talar. Ymiskar sangkreftir verða við.